# Ársfrágreiðing 2019



SAVNS GULL

## SavnsGull 2019

**Annika Elsa Højsted**
Skrásetari

**Bára Svabo Persson**
Skrásetari og talgildari

**Bárður Hansen**
Skrásetari

**Bireta Jógvansdóttir Hansen**
Talgildari

**Brandur Simonsen**
Skrásetari

**Elisa Abrahamsen**
Skrásetari

**John Rimestad**
Skrásetari

**Jógvan í Toftum Olsen**
Talgildari

**Mass Hoydal**
Verkætlanarleiðari

**Sigurbjørg Fríða Nielsen**
Skrásetari

## Stýrisbólkur 2019

**Annika Smith**
Stjóri á Landsbókasavninum

**Ivan Hentze Niclasen**
Stjóri í Kringvarpinum

**Jóhann Mortensen**
Tíðindafólk í Kringvarpinum

*Forsíðumynd:*
*Høgni Heinesen, Heinesen Myndir*

# Innihald


Formæli .......... 3
Føroya Fólks miðlasavn .......... 4
Visión og missión .......... 5
Søgugongd fyri verkætlanina .......... 6
Pappírsparturin .......... 8
Ljóðparturin .......... 10
Sjónvarpsparturin .......... 12
Savnið hjá Føroyamálsdeildini bjargað .......... 15
Út til fólkið .......... 16
Fíggjarliga nýtslan 2019 .......... 19




# Formæli

Verkætlanin, “SavnsGull”, ið hevur til endamáls at talgilda banda-savnið í Kringvarpinum, hevur nú 6 ár á baki.

Hetta rúgvismikla, søguliga tilfarið, ið er framleitt á føroyskum um føroysk viðurskifti, er ein týdn-ingarmikil partur av mentanar-arvinum, ið er verdur at varðveita.



Ein stórur partur av tilfarinum er talgildaður og klárur at brúka hjá okkum øllum og komandi ættar-liðum til læring, gransking og sum undirhald.

Okkurt er longu tøkt á alnótini, men nú er verkætlanin komin so langt, at hugsast skal um, hvussu skilabest er at miðla tilfarið.

Hvussu skal tað miðlast og á hvørjum palli?

Miðlalandslagið broytist støðugt, fólk flyta seg av palli til pall, og læringin gongur fyri seg á alnótini. Menningin á økinum hevur verið eksplosiv seinnu árini, og leik-luturin hjá miðlunum er nógv broyttur. Brúkarin verður díktur undir við útlendskum tilfari, við “fake-news”, við skjótum tíðindum og við yvirskriftum.

Fólk fara frá teimum siðbundnu miðlunum til at brúka aðrar miðla-pallar. Serliga børn og ung verða eksponeraði fyri komersiellum og reklamubornum innihaldi av skiftandi góðsku, tá tey sita við skermin.

Vit liva møguliga í eini tíð, har fávitska er ein dygd. Vandi er fyri, at vit fáa eina modernaða almúgu, har miðlingin í høvuðsheitum er søgur úr sosialu miðlunum. Tí er brúk fyri einum slagi av public ser-vice, sum “SavnsGull” kann veita.

Um tilfarið verður lagt út og skrá-sett á skilagóðan hátt, minka vit um vandan fyri “fake-news” og fávitsku.

Møguleikin at breiða dygdargott tilfar skal vera til staðar. Læringin gongur fyri seg allastaðni, har sam-band er við alnótina, tí á alnótini ferðast vit í ymsum læringsrúmum, ogna okkum førleikar, fáa nýggj hugskot og hava møguleikan at skapa nýggja vitan. Hetta kann verða gróðrarbotnur til lívslanga læring. Tað er í hesum meldrinum av upplýsing, at “SavnsGull” skal vera til staðar.

**Annika Smith**
*Landsbókavørður*

# Føroya Fólks miðlasavn

Savnsgullið er eitt tilfeingi, sum kann menna okkara vitan, samleika og søgu um Føroyar og menna okkum sum føroyingar.

Kringvarpssavnið goymir ein heilt serstakan og stóran part av Føroya søgu frá 6. februar 1957 og fram til dagin í dag. Í savninum eru frásagnir um nærum alt, sum er hent í Føroyum innan øll øki, og tað er miðlað óheft. Nýtt tilfar verður hvønn dag gjørt, og savnið veksur á henda hátt, og okkara søga verður goymd til eftirtíðina.

Tað er tann eldri parturin av Kringvarpssavninum, sum verkætlanin SavnsGull skal talgilda, soleiðis at tað kann varðveitast til eftirtíðina.

Tann eldri parturin av kringvarpssavnið fevnir um 521.179 pappírsskjøl, 26.846 útvarpsbond og væl omanfyri 14.000 sjónvarpsbond. Og savnið er á goymslu á tveimum støðum: á Hjalla og í Sortudíki.

Longu undan aldaskiftinum varð tosað um, at tíðin máaði burtur av tilfarinum í savninum, og at okkurt mátti gerast fyri at bjarga tí. Tað hevur verið drúgført at koma so langt áleiðis at farast kundi undir arbeiðið at bjarga savninum.

Í 2014 vórðu lunnar lagdir undir verkætlanina, SavnsGull. Verkætlanin, sum skal bjarga savninum á tann hátt, at alt skal verða talgildað. Harumframt skal SavnsGull eisini arbeiða fyri at geva almenninginum atgongd til tilfarið.

# Visión

Við at talgilda kringvarpssavnið skal Kringvarp Føroya verða størsta savn innan tíðindi, mentan og siðsøgu í Føroyum.

Við tíðini skal almenningurin hava atgongd til savnið, og við hesum skal Kringvarp Føroya verða fremsti mentanarberi innan økið.

# Missión

Missiónin er at bjarga øllum tilfari í Kringvarpssavninum.

Góðskan á tilfarinum skal vera høg eins og skrásetingin.

Við hesum tilfari skal Kringvarp Føroya ríka søgu, lív og samleika føroyinga við sendingum og tænastum, sum upplýsa, menna, undirhalda og varðveita Føroya søgur.

# Søgugongd fyri verkætlanina

Tosað varð um at bjarga útvarps- og sjónvarpssavninum, áðrenn Kringvarpið varð sett á stovn. Longu í 2002, tá Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya vóru tveir stovnar, var skriv at lesa í Dimmalætting, at nú vóru bondini um at forfarast.

Í 2010 varð í eini frágreiðing mett um savnið, m.a. varð mett um, hvat kravdist fyri at bjarga savninum: 2,7 milliónir um árið í 10 ár, sum hevði við sær, at ljóðbond og sjónvarpsbond kundu verða bjargað.

Eitt týðandi stig at bjarga tilfarinum kom undan kavi, tá ið verklagslógin at byggja út kringvarpshúsið var fyri í fíggjarnevndini í mai 2013. Fíggjarnevndin skrivar í áliti sínum, dagfest 3. mai 2013, soleiðis um bandasavnið:

*Fíggjarnevndin heldur, at nú útbyggingar verða framdar, er neyðugt samstundis at taka støðu til, hvussu bandasavnið í kringvarpinum verður varðveitt. Fíggjarnevndin heldur tí, at landsstýrismaðurin til fíggjarlógina fyri 2014 eigur at fyrireika eina skipaða gongd, so ferð verður sett á varðveitslu av bandasavninum frá 1. januar 2014. Landsstýrismaðurin eigur saman við kringvarpinum at umhugsa, um uppgávan kann bjóðast út. Eisini eigur landsstýrismaður at umhugsa, í hvønn mun uppgávan kann gerast av fólki í vardum starvi.*

Í 2013 samtykti løgtingið eina eykajáttan á 800.000 kr. Játtanin varð nýtt til at fáa tól til vega at talgilda útvarpsbondini við, eins og gamlar bandamaskinur hjá útvarpinum vórðu umvældar til hetta arbeiðið. Í 2014 vórðu játtaðar 900.000 kr., so gongd kundi koma á arbeiðið at talgilda savnið. Mass Hoydal varð settur sum samskipari. Fyrsta uppgáva hansara var at fáa lýst, hvussu farast kundi til verka. Tingið játtaði eisini verkætlanini 900.000 kr. í 2015, og Mass Hoydal varð settur sum leiðari fyri SavnsGull, sum verkætlanin varð nevnd.

Tey fyrstu árini fevndi arbeiðið um at talgilda pappírspartin og ljóðpartin. Í 2016 varð framtíðin hjá sjónvarpsbondunum greið, har A. P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal játtaði 5 milliónir krónur.

Í 2017 kom gongd á at talgilda sjónvarpspartin; alt Kringvarps-savnið verður nú talgildað og varð-veitt til komandi ættarlið.

Tá bjargingin av savninum í Kring-varpinum var komin í eina trygga legu, kom fyrispurningur frá Føroyamálsdeildini á Fróðskapar-setrinum, um til bar at talgilda ljóðsavnið hjá teimum. Eftir tvey ár var henda uppgávan liðug. Í einum lítlum landi sum Føroyar er týd-ningarmikið, at vit arbeiða saman. Hetta hevur verið eitt gott sam-starv, har hesin parturin av okkara søgu nú er varðveittur til eftirtíðina.

Umframt at bandasavnið skal bjargast, stendur í galdandi Public service sáttmála frá 1. januar 2017, at *Verkætlanin SavnsGull hevur til endamáls [...] at gera tilfarið at-geingiligt fyri borgaranum.* Arbeitt verður við einari ætlan, hvussu KVF og SavnsGull kunna arbeiða saman um hetta.


600.000
500.000
400.000
300.000
200.000
100.000
0
Jun 2014
Okt 2014
Feb 2015
Jun 2015
Okt 2015
Feb 2016
Jun 2016
Okt 2016
Feb 2017
Jun 2017
Okt 2017
Feb 2018
Jun 2018
Okt 2018
Feb 2019
Jun 2019
Okt 2019
Feb 2020
Jun 2020
Okt 2020
Feb 2021
Jun 2021
Okt 2021
Feb 2022
Jun 2022
Okt 2022
Feb 2023
Jun 2023
Okt 2023
Ætlan
Talgildað og skrásett

# Pappírsparturin

Tíðindaskjølini — pappírsparturin — er tann mest støðuga og samansetta eindin í kringvarpssavninum. Í hesi savnseindini eru nærum øll tíðindi goymd síðan fyrstu útvarpssendingina tann 6. februar 1957 og fram til 1996, tá pappír varð skift út við teldu. Telduskipan varð brúkt undan 1996, men tá í tíðini vórðu øll tíðindi prentað út og goymd sum skjøl. Øll hesi árini eru nógv pappír savnað í goymsluni, ið telur væl omanfyri 500.000 pappírsskjøl. Nógv tann størsti parturin er tíðindi, men í savninum eru eisini skráir, veðurtíðindi, Koda-listar og annað tilfar úr útvarpinum.

Arbeiðið gongur støðugt framá, og starvsfólkið í SavnsGull skanna, skráseta og rætta eitt og eitt skjal, soleiðis at tað ber til at finna evni, ið ein sóknast eftir. Nógv er komið burturúr, og samanlagt eru nú væl omanfyri 300.000 skjøl liðug.


30.000
25.000
20.000
15.000
10.000
5.000
0
Jun 2014
Okt 2014
Feb 2015
Jun 2015
Okt 2015
Feb 2016
Jun 2016
Okt 2016
Feb 2017
Jun 2017
Okt 2017
Feb 2018
Jun 2018
Okt 2018
Feb 2019
Jun 2019
Okt 2019
Feb 2020
Jun 2020
Okt 2020
Feb 2021
Jun 2021
Okt 2021
Feb 2022
Jun 2022
Okt 2022
Feb 2023
Jun 2023
Okt 2023
Ætlan talgildað — *SavnsGull*
Talgildað — *SavnsGull*
Ætlan talgildað — *Fróðskaparsetrið*
Talgildað — *Fróðskaparsetrið*

# Ljóðparturin

Útvarpsbondini goyma nógvar ymiskar sendingar, eitt nú frásagnir, reportasjur, fyrilestrar, barnaútvarp og mangt annað. Í savninum eru 26.846 bond. Tað fyrsta er frá 6. februar 1957, tá útvarpið sendi fyri fyrstu ferð. Í 2001 varð seinasta ljóðbandið nýtt í Útvarpi Føroya, og síðani er alt tikið upp á teldu og talgildað.

Sum sæst á myndini niðanfyri, er arbeiðið at talgilda bondini ikki gingið sum væntað í 2019. Ein stóran part av árinum hava vit bert kunnað talgildað við tveimum maskinum, har vit annars hava møguleikan at talgilda við fýra maskinum í senn. Hetta kemst av, at bandamaskinurnar eru gamlar, og slitið er nú blivið somikið umfatandi, at tær javnan ganga fyri. Tá maskinurnar ganga fyri, er neyðugt at senda boð eftur útlendskum serfrøðingi, og maskinlutir mugu í summum førum sendast til umvælingar, tí eykalutir fáast ikki til keyps. Hetta er eitt tekin um, at tað var í tøkum tíma, at verkætlanin at bjarga Kringvarpssavninum kom í gongd.

Hetta er ein altjóða trupulleiki, at tað ikki eru tól at talgilda ljóð- og sjónvarpsbond við, sum UNESCO á hvørjum ári leggur dent á, tá altjóða dagur fyri mentanararv, goymdur á ljóð- og sjónvarpsupptøkum, verður hildin 27. oktober á hvørjum ári.

Hóast hesar avbjóðingar, gongur arbeiðið støðugt framá, og alt bendir á, at tann seinasti parturin verður talgildaður, væl áðrenn verkætlanin skal vera liðug í 2023.

*Um alt gongur sum væntað,*
*verður tað seinasta bandið*
*talgildað í Belgia í 2020.*

# Sjónvarpsparturin

Sjónvarpið varð alment sett á stovn 1. apríl 1984, og sjónvarpsbondini, ið skulu talgildast, eru omanfyri 14.000 í tali. Talan er um fleiri ymisk sløg av bondum, ið krevja ymiskar førleikar og útgerð, ið eru ring at fáa hendur á.

Í 2016 kom stuðul frá A. P. Møller Fonden uppá 5 milliónir krónur. Við hesari upphæddini verður møguligt at talgilda øll bondini, sum eru í varðveitslu í Kringvarpssavninum.

Arbeiðið hevur gingið skjótt og væl. Fyrst varð farið undir at arbeiða við tí elsta partinum, sum er goymdur á U-Maticbondum. Eftir at fyritøkur fingu í boði at bjóða uppá arbeiðið at talgilda sjónvarpssavnið, varð avgjørt, at Memnon í Belgia skuldi fáa hetta arbeiðið.

Eftir at bond eru gjørd klár og pakkað til ta longu leið, eru vit tvey, sum fara avstað úr Føroyum við bondunum. Hetta er tann tryggasti, bíligasti og besti mátin at fara við bondunum til Belgia. Øll tey elstu bondini eru nú talgildað og varðveitt til eftirtíðina. Í 2019 varð farið undir at talgilda Betacam. Um alt gongur sum væntað, verður tað seinasta bandið talgildað í Belgia í 2020, og tá er sjónvarpsparturin, sum SavnsGull skal talgilda, at enda komin og bjargaður.

Arbeiðið hevur tí gingið nakað betur enn væntað. Men sum tað fyrr hevur verið tikið til, er tað í tøkum tíma, at okkara mentanararvur varð bjargaður.



# Savnið hjá Føroyamáls-deildini bjargað

Savnið hjá Føroyamálsdeildini er eitt serstakt savn. Har eru m.a. nógvar ljóðupptøkur, ið eru væl eldri enn 1957, tá Útvarpið varð sett á stovn. Tá Mortan Nolsøe, professari, kom til Føroyamáls-deildina at arbeiða í 1973, hevði hann nógv bond við sær. Síðani eru bond løgd afturat, har nógv eru komin frá Dansk Folkeminde-samling. Bondini geva okkum eitt serligt innlit í okkara mentan. Upptøkurnar umfata gamlar upptøkur við føroyingum, ið syngja, kvøða og siga frá frásagnum um staðarnøvn, trúgv, siðir o.s.fr.

Tá Føroyamálsdeildin heitti á SavnsGull um at talgilda ljóðbond í savninum, varð umbønin játtað. M.a. tí at tað bert er ein avmarkað tíð eftir at talgilda ljóðbond í, og av tí at tøknin og vitanin eru um at hvørva. Ikki bert um okkara leiðir, men um allan heim. Tí er týdningarmikið, at vit í einum lítlum landi sum Føroyar gera nógv fyri at hjálpa hvørjum øðrum og fáa varðveitt okkara mentanararv. Vit í Kringvapinum hava tøknina og vitanina, og nú tá hetta arbeiðið er gjørt, eru vit sera fegin at hava verið partur av at varðveita savnið hjá Føroyamálsdeildini.

Tað er serliga gleðiligt, at vit øll eisini ómakaleyst kunna leita í talgilda savninum í Føroyamálsdeildini (https://bandasavn.setur.fo/), og vit í nógvum førum kunna hoyra upptøkur av okkara forfedrum.

# Út til fólkið

Tað var ein klókur maður, sum einki segði. Øll vistu, hvussu klókur hann var, men tá hann doyði, visti eingin, hvat hann visti. Hetta segði professari Jóan Pauli Joensen, tá hann í morgunsendingini í Kringvarpinum greiddi frá, at bókarøðin Trap Danmark nú fór undir at fyrireika arbeiðið at skriva nýtt verk um Føroyar. Eitt verk, ið rúmar lýsingar av kommunum í ríkisfelagsskapinum. Verkið er rúgvumikið og er um náttúru og landskap, søgu, bý og bygd, mentan, samfelag og vinnu. Sagt varð eisini í sendingini, at um føroyingar vilja hava hetta verkið um Føroyar, so eru vit noydd eisini at taka um endan sjálvi.

Hetta er ein søga, sum kann samanberast við okkara arbeiði í SavnsGull. Flest øll vita, at savnið í Kringvarpinum er rúgvumikið, ella vit øll kunna blíva klókari av at brúka savnið.

Nú vit eru komin langt í bjargingini, ræður um at fara undir at geva almenninginum atgongd til hetta tilfarið. Tað hevði verið sera harmiligt, um tilfarið verður bjargað, men almenningurin ikki fekk ágóðan av tilfarinum í savninum, annað enn at KVF onkuntíð fann eitthvørt fram úr savninum. Tá hevði tað verið, sum tá hin klóki maðurin einki segði.

Vit eru eisini noydd at taka um endan sjálvi, um hetta savnið skal gerast enn meira tøkt hjá almenninginum, enn tað er í dag. SavnsGull og KVF eru farin undir eina tilgongd, hvussu hetta skal fara fram.

KRINGVARP FØROYA

| **Útreiðslur** | **2017** | **2018** | **2019** |
|---|---:|---:|---:|
| Lønir v.m. | 467.089 kr. | 316.591 kr. | 393.585 kr. |
| Keyp av vørum og tænastum | 9.699 kr. | 9.080 kr. | 152.541 kr. |
| Keyp av útbúnaði | 43.451 kr. | 36.800 kr. | 4.963 kr |
| **Tilsamans** | **520.239 kr.** | **362.471 kr.** | **551.089 kr.** |

# Fíggjarliga nýtslan 2019

Arbeiðið at bjarga Kringvarpssavninum verður fíggjað við játtan á fíggjarlógini, uttanhýsis fígging frá A. P. Møller Fonden og fígging frá KVF. Á hvørjum ári hevur fíggingin frá tí almenna verið nýtt til at talgilda og skráseta útvarpspartin, sum fevnir um pappírstíðindini og ljóðpartin. Fíggingin frá A. P. Møller Fonden hevur verið brúktur til at talgilda tann eldra partin av sjónvarpsbondunum.

SAVNSGULL

| **Útreiðslur** | **2017** | **2018** | **2019** |
|---|---:|---:|---:|
| Lønir v.m. | 1.178.847 kr. | 1.245.259 kr. | 1.299.544 kr |
| Keyp av vørum og tænastum | 323.652 kr. | 740.956 kr. | 478.100 kr. |
| Keyp av útbúnaði | 58.686 kr. | 30.484 kr. | 40.269 kr. |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 15.600 kr. | 22.496 kr. | 18.000 kr. |
| **Tilsamans** | **1.576.785 kr.** | **2.039.195 kr.** | **1.835.913 kr.** |

| **Inntøkur** | | | |
|---|---:|---:|---:|
| Søla av tænastum | 100.060 kr. | 102.060 kr. | 96.565 kr. |
| Flytingarinntøka | 584.421 kr. | 1.037.596 kr. | 693.538 kr. |
| **Tilsamans** | **684.481 kr.** | **1.139.656 kr.** | **790.103 kr.** |

*A. P. Møller og Hustru*
*Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal*

MENTAMÁLARÁÐIÐ

KRINGVARP FØROYA

SavnsGull — Kringvarp Føroya — Postsmoga 1299 — Norðari Ringvegur 20 — 100 Tórshavn